# Fótbóltspolitikkur

**At broytta kappingin at kalla bara er viðgjørd á nevndarplani, kann vísa seg sum politiskt sjálvmál, um illa vil til. Ella kanska var talan bara um eina taktiska manøvru**



*Var talan um mangul upp á konsensus í førda politikkinum, ella var talan bara um eina taktiska manøvru, tá Kappingarnevndin hjá FSF longdi kappingina upp í 27 umfør*

**Kappingin**
*Jákup Mørk*

At kappingin ikki varð koppað á, tá kappingin nú kortini skuldi broytast, man einamest vera ein fótbóltspolitiskur spurningur. Kappingarnevndin hevur einsamøll fulla heimild til at gera av, hvørt kappingin skal vera 9, 18 ella 27 umfør. Ella okkurt heilt annað fyri tað. Kappingarreglurnar staðfesta bara, at talið av liðum í fyrstu deild er tíggju, og - kanska meira týdningarmikið - at kappingarárið er 1. januar til 31. desember.

Tí skuldi ein broyting til eina koppan av kappingini verið løgd fyri aðalfundin. Og tað er ivasamt, um tað upskotið hevði fingið undirtøku longu nú. Ikki minst, tí tað enn ikki hevur verið nakað veruligt orðaskifti um eina umlegging av kappingini. Gaman í høvdu feløgini møguleika at viðgera málið á árliga fundinum millum FSF og feløgini, men tað er tó ivasamt, hvussu djúp hendan viðgerðin var. Í øllum staðfesti Petur Simonsen eftirfylgjandi »fundurin dró út, og ein fittur partur av feløgunum var farin, tá málið bleiv lagt fram«.

## Skeivt forum

Hartil er eisini óhugsandi, at ein fundur, har alskyns onnur viðurskifti innan føroyska fótbóltsheimin eisini standa á skránni, skal ikki bara viðgera men eisini samtykkja eitt slíkt stórmál. Heldur skuldi talan her verið um ein heildagsfund - ella kanska fleiri - við bara hesum eina málinum á skránni. Kanska vildi talan ikki verið 100% semju um málið, men viðgerðin vildi í øllum førum verið breiðari, og sannlíkindini fyri at finna eina breiða semju, vildu helst eisini verið størri.

At formaðurin í kappingarnevndini so eftirfylgjandi í sjónvarpi segði, at »tað kann væl vera, at drúgvari orðaskiftið skuldi verið um hetta, men eg eri sannførdur um, at úrslitið kortini vildi verið tað sama«, var nokk ikki tað allar smartasta. Ikki akkurát eitt úttalilsi, sum bendir á ein konstruktivan dialog, har møguleiki annars vildi veriðat skapt konsensus fyri eina komandi broyting.

Nakað annað er so tað, um talan er um eina taktiska manøvru av Bjarka Mohr. Fyrsta árið við nýggju skipanini er royndarár, og tí er ein eftirmeting av hesum sjálvandi uppá sítt pláss, tá fundur við feløgini aftur verður á skránni seint í heyst.

Og til ta tíð verður helst talan um eina av trimum niðurstøðum. Nevnliga

- At feløgini halda nýggja leistin vera góðan,
- At feløgini vilja fremja broytingina fult út, soleiðis at kappingin verður koppað á, ella
- At feløgini vilja sleppa aftur til gamla leistin við 18 dystum og bólkaspæli í steypakappingini

## Kanska sjálvmál

Vónin hjá kappingarleiðaranum er ivaleyst, at feløgini taka undir við nýggja leistinum, og kanska enntá eisini við at koppa kappingini á. Ein støða, sum kann geva tað úrslit, at aðalfundurin tekur avgerð um at broyta kappingina.

Hinvegin kann væl hugsast - ikki minst um veðrið fer at arga seinastu umførini - at feløgini ikki vilja hoyra talan um nakað annað, enn at venda aftur gomlu skipanina. Tá vil kappingarleiðarin standa við einum trupulleika. Antin at bakka, ella at risikera eina vraking á aðalfundinum, har hann er ein av nevndarlimunum, sum stendur fyri vali.

Hinvegin er einki at ivast í, at kappingarstjórin við hesum hevur sett hol á málið. Hvørt feløgini vilja tað ella ikki, so verður kappingarleisturin nú ein spurningur, sum tey verða noydd at fyrihalda seg til. Og er úrslitið, at vit fáa eitt bæði breit og djúpt orðaskifti um spurningin, so er nógv vunnið.

# Oyðileggur upp- og niðurflytingina

**Tað er ómetaliga óheppið, at ein broytt landskapping, har dystartalið verður økt við einari helvt, bert fevnir um fyrstu deild**

**Broytt landskapping**
*Jákup Mørk*

Fyrst og fremst, tí hetta at kalla køvir seinasta spenningin í spurninginum um upp- og niðurflyting. Her verður støðan tann í heyst, at felagið, sum endar næstfremst í aðru deild eftir steðg á ein mánað, skal spæla tveir dystir móti einum væl trimmaðum fyrstu deildarliðið. Oftani hevur munurin á hesum liðum verið stórur frammanundan, men so ólíka fortreytum verður ójavnvágin enn størri.

Argumentið, sum kappingarstjórin nýtti í hesum, tóktist ikki vera so øgiliga væl umhugsað. Sagt varð, at tað kortini mest sum altíð var so stórur munur á liðunum kortini, at hetta fór ikki at bila stórvegis.

Hóast ovara liðið aloftast hevur verið við yvirlutan, tá slíkir dystir hava verið á skránni, so kann tað á ongan hátt verða nøkur grundgeving. Vit skulu heldur ikki longur aftur enn til Skála í 2001, fyri at finna eitt lið, sum megnaði at spæla seg upp í fyrstu deild gjøgnum teir báðar dystirnar. Og sum kunnugt, so hevur ikki gingið heilt illa hjá teimum síðani.

Og soleiðis, sum styrkislutfallið í aðru deild tykist verða í ár, so gerst støðan enn meira óheppin, um tað er gjørligt.

Við einum B68-liði, sum nærum tykist ætla sær upp í bestu deildina við fullum stigatali, verður tað fyri hini liðini bara ein spurningur um annað plássið í deildini. Men um tað annað plássið gevur so minimalar møguleikar fyri uppflyting, so er spurningurin, um feløgni ikki bara eru nøgd, um tey halda eina góða støðu, og annars mugu bíða við øllum uppflytingardreymum til 2006. Og tað vildi í øllum førum ikki verið ein serliga mennandi støða fyri feløg og leikarar.